# Magnus Heinason yvirlitstrolar



*Magnus Heinason landaði part av veiðuni frá yvirlitstrolingunum á Sørvági fyrr í vikuni*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Magnus Heinason ger í løtuni fyrra part av árligu yvirlitstrolingunum. Seinna helvtin verður gjørd einaferð í august. Veiðan, hann fær, verður avreidd og gongur inn í raksturin av skipinum**

FISKIRANNSÓKNIR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Magnus Heinason legði einar 600 kassar upp í Sørvági í vikuni. Hetta er fiskur, sum fingin er í yvirlitstrolingunum, sum skipið álriga ger fyri Fiskirannsóknarstovuna.

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á fiskirannsóknarstovuni, greiðir frá, at teir gera tvær slíkar ferðir árliga. Eina nú um várið, og so eina aftur í august.

Á hesum túrunum verður farið eftir føstum rutum. Um várið hava teir 100 trolstøðir um allan grunnin, meðan teir um heystið royna tað dupulta. 200 trolstøðir.

Hjalti í Jákupsstovu greiðir frá, at teir seinastu 20 árini hava brúkt sama slag av troli og roynt á júst somu økjum hvørja ferð fyri á tann hátt at fáa eina so neyva mynd, sum gjørligt, av støðuni.

Veiðan varð hesaferð løgd upp í Sørvági. Tað var meira ella minni tilvildarligt, sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni.

Vártrolingin er ikki liðug enn, sigur hann. Einar 10-12 støðir mangla enn, og hann kann einki siga um úrlsitið av kanningunum, fyrr enn liðugt er, og alt er samanborið.

Tá hesar yvirlitstrolingarnar eru lidnar, fer Magnus Heinason i Vágahavið at merkja tosk, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Tað, sum Magnus Heinason fær undir hesum royndunum, verður avreitt sum allur annar fiskur á marknaðinum. Inntøkan fer til raksturin av skipinum, sum soleiðis fíggjar ein part av virkseminum sjálvt.

Hinvegin plagar manningin at fáa part, tá gjørdar verða royndir á eitt nú djúpum vatni, sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni.

Tann, sum áhugaður er í kanningunum hjá Fiskirannsóknarstovuni kann fara inn á heimasíðuni hjá stovninum, sum eitur: www.frs.fo, og haðani leita seg fram til tað, sum stendur undir fiskirannsóknum.




Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

hósdag til sunnudag ella fríggjadag til mánadag
21/02 - 25/02, 25/02 - 4/03 og 07/03 - 11/03

Unna tær eina fríløtu í Keypmannahavn. Eitt vikuskifti har tú tekur tær av løttum, spákar ein túr á "Stroynum" ella fært tær ein góðan bita í Nýhavnini.

**Íroknað er** flogferð, ferðaavgjøld og innivist á Hotel Du Nord í 3 nætur við morgunmati.

Fráferð úr Vágum hósdag ella fríggjadag. Fráferð úr Keypmannahavn sunnudag ella mánadag.

3.325,-
Prísur fyri hvønn í dupultkamari

4.090,-
Prísur fyri hvønn í einkultkamari

**Hotel Du Nord**
Hotel Du Nord liggur mitt í Keypmannahavn, 110 m frá Høvuðsjarnbreytastøðini, og tætt við Ráðhúsplássið, Strøget, Tivoli.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin




# Bóndi datt oman og doyði

**Mikudagin eftir middagsleitið datt ein 46 ára gamal maður í Fuglafirði oman og doyði. Maðurin var bóndi í Fuglafirði og var á veg norður í Halgadal at hyggja eftir seyðinum**

VANLUKKA
*Stefan í Skorini*



*46 ára gamli Jógvan Z. Joensen var á veg burtur í haga norður í Halgadal, tá hann var áhaldsin og datt í eina gjógv. Tað var her á leiðini, at vanlukkan hendi*
*Mynd: Øssur Mohr*

46 ára gamli Jógvan Z. Joensen, sum var bóndi í Fuglafirði, doyði mikudagin í syndarligari vanlukku.

Hann var saman við systur síni á veg norður í Halgadal at hyggja til seyðin og gera okkurt arbeiði í seyðahúsinum.

Tá tey bæði koma til Norðaru Gjógv, sum er ein hálvan tíma til gongu frá bygdini, er bóndin áhaldsin og dettur niður í gjónna. Fallið var einar 30 metrar, og hann er eftir øllum at døma deyður í fallinum. Hetta upplýsir løgreglustøðin í Runavík fyri Sosialinum.

Sera illgongt var á hesum staðnum, tí tjúkkur og harður kavi lá við gjónna. Júst tá maðurin er komin yvir um ánna, beint omamvert gjónna, missir hann fótafestið og glíður niður í gjónna. Annars var gott gangandi eftir rásini, inntil tey komu til gjónna. Bóndin hevði høgt sær eina rás tvørturum ánna við fjallstavinum

Um tað mundið vóru tveir bátar útfyri gjónni. Kvinnan rópar á hesar bátarnar og biður um hjálp. Annar báturin fer út á eina leið, har telefonsambandið var frægari og ringdi eftir hjálp.

Hin báturin, sum var ein alibátur úr Oyndarfirði, sigldi inn móti landi og setti tveir ungar mans í land. Teir fóru fyrst niðan til kvinnuna og síðani niður í gjónna eftir manninum. Tá vóru fleiri fólk komin til hjálpar. Teir báðir menninir fylgdu síðani kvinnuni aftur til bygdina.

Tyrlan kom síðani eftir manninum, og hann varð fluttur á sjúkrahúsið í Havn. Hildið verður tó, at maðurin doyði á staðnum.

Ætlanin var, at Jógvan og systirin skuldu við báti norður í Halgadal, men báturin fekk okkurt um skrúvuna og mátti tí venda aftur. Tey bæði vórðu síðani sett í land og skuldu ganga restina av teininum. Tey komu tó ongantíð so langt. Maðurin var ógiftur.

# Forngripir aftur til Føroya

**Danski mentamálaráðharrin hevur givið boð um, at Fornminnissavnið í Føroyum kann fáa nakrar savnsgripir, sum hava verið í Danmark, aftur til Føroya. M.a. einasti skattur, sum nakrantíð er funnin í Føroyum, verður nú latin Fornminnissavninum**

FORNGRIPIR
*Stefan í Skorini*

Stutt fyri jól í fjør hevði Nevndin fyri danska-føroyska Savnssamstarvinum sín seinastu fund, har hon legði seinastu hond á eina tilráðing til danska mentamálaráðharran, Brian Mikkelsen. Nevndin vísti í hesi tilráðingini á, hvørjir forngripir, hon metti, skulu aftur til Føroya.

Danski mentamálaráðharrin hevur góðkent hesa tilráðing og givið danska Nationalmuseet boð um at lata Føroya Fornminnissavni teir forngripir, sum nevndin mælir til.

Forngripirnir, sum talan er um, eru gjøgnum tíðirnar sendir Oldnordisk Museum, Nationalmuseet, Den Kongelige Mønt- og Medaillesamling, Dansk Folkemuseum og Frilandsmuseet.

– Sum grundarlag undir tilráðingini hevur nevndin mett um, hvar hvør einstakur savnslutur kann hugsast at hava størst virði sum heimildartilfar fyri granskingog upplýsing, sigur Fornminnissavnið í tíðindaskrivi.

Hetta eru gripir, sum hava stóran týdning í føroyskari søgu, eisini persónssøgu, og sum nú verða latnir Føroya Fornminnissavnið. Somuleiðis gripir, sum Føroya Fornminnissavn frammanundan ikki hevði makan til.

Tó vera savnslutir, sum hava alstóran savnssøguligan týdning fyri Nationalmuseet, verandi har. Eisini hevur nevndin í tilráðingini tikið hædd fyri, at Nationalmuseet framvegis á fullgóðan hátt kann lýsa føroyska mentan.

Teir savnslutir, sum nú verða sendir til Føroya, verða sýndir fram á Nationalmuseet. Framsýningin letur upp fyri almenninginum frá 23. mars til 9. juni. Ætlanin er at hava framsýningina á Fornminnissavninum fyri Ólavsøku, tá formliga handanin fer fram.

## Skattur av Sandi

Einasti veruligi skattur, sum nakrantíð er funnin í Føroyum, verður nú aftur at síggja í Føroyum. Hann varð funnin í kirkjugarðinum á Sandi, og sýslumaðurin Mads Andreas Winther sendi skattin til Danmarkar, og í dag liggur hann á Møntsamlingen. Skatturin er eini túsund ára gamal. Nevndin mælir til, at hesin skatturin verður latin Fornminnissavninum.

Fleiri aðrir áhugaverdir gripir verða aftur at síggja í Føroyum, og teir verða sýndir fram fyri Ólavsøku.

Ígjøgnum tíðirnar hava embætisfólk, amtmenn, læknar, bøndur og onnur latið donskum søvnum nógvar forngripir. Í hesum sambandi er avtala gjørd um, at Føroyar kunnu fáa ein part av hesum lutum aftur.


hallo.fo

PÁSKATILBOÐ !!
frá Hallo.fo



NOKIA 3310 - kr. 1295,-
NOKIA 3330 - kr. 1495,-
Tilboðini eru bert galdandi til 04.04.02
(ella so leingi vøran er á goymslu)

NOKIA ERICSSON SIEMENS MOTOROLA

allo o
…..far inn á www.hallo.fo ella ring tlf. 218-500